# Buklufrøðingur søkist

## TRYGD leitar eftir bilsýnsfólki

**STARVIÐ**
Talan er um starv við fjølbroyttum uppgávum, sum m.a. fevna um skaðasýn, inntekningarsýn og ítøkiliga skaðaviðgerð. Sum bilsýnsfólk hevur tú nógv samband við kundar og bilverkstøð, so umframt at vera fakliga væl fyri, mást tú eisini vera fyrikomandi.

**TÚ**
Tú ert bilsmiður ella hevur aðra nøktandi útbúgving og royndir á viðkomandi øki. Tú hevur teldukunnleika og dugir væl at samskifta. Tær dámar at arbeiða sjálvstøðugt, men trívist eisini væl í toymi. Tær dámar at hava ábyrgd og dugir at raðfesta. Tú ert opin og virkin.

**UMSÓKNIR OG STARVSSETAN**
Starvið verður sett skjótast til ber ella eftir avtalu, tí vit eru sinnað at bíða eftir rætta fólkinum. Møguligir spurningar kunnu setast Onnu Mohr Joensen, leiðara á Skaðatænastuni, á tlf. 358141 ella á amj@trygd.fo.
Skrivlig umsókn við viðkomandi skjølum skal sendast til Jean Djurhuus, stjóra, á jdj@trygd.fo, ella til P/F TRYGD, Gongin 7, Postboks 44, 110 Tórshavn, stílað Jean Djurhuus.

**SOLEIÐIS ER TRYGD**
TRYGD er ein skjótvirkin og slóðbrótandi fyritøka, ið mangan setur dagsskránna í føroyska tryggingarheiminum. TRYGD grundar virksemi sítt á dygd, skjóta avgreiðslu, greidleika, nýhugsan og lønsemi.

TRYGD er eisini ein sterk og framlítandi eind, ið veit, hvussu týðandi tað er at geva fjølbroyttum og skapandi menniskjum rásarúm. Hjá TRYGD starvast 21 fólk, og vit umseta í dag fyri meira enn 90 mió. krónur um árið.

TRYGD bjóðar tær góðar møguleikar fyri yrkisligari og persónligari menning í einum virknum og nýskapandi toymi. Tú verður við til at flyta felagið inn í framtíðina, og vit síggja tínar persónligu dygdir sum ein týðandi lut í at gera TRYGD enn sterkari.

Kemur tú við?

LES MEIRA UM STARVIÐ Á WWW.TRYGD.FO
UMSÓKNARFREISTIN ER 1. FEBRUAR 2009

**TRYGD**
leitar eftir tær.



# SJÓNDEPILIN søkir eftir deildarleiðara til virkishús fyri blind og sjónveik

Virkishúsið er nýtt sjálvstøðugt virkisøki. Deildarleiðarin verður við til at evna karmar og innihald í arbeiðinum, og kemur at varða av dagligu leiðsluni.

**KRAV TIL PERSÓNLIGAR FØRLEIKAR:**
Jalig (ur), tolin, nýskapandi, dugir at samskipa, taka ábyrgd, loysa ósemjur, hevur hugflog og evnir at læra frá sær ymiskt handaligt arbeiði.

**KRAV TIL FAKLIGAR FØRLEIKAR:**
- Útbúgving t.d. pedagogur, lærari, ergo terapeutur, ítrívsvegleiðari.
- Útbúgving innan ymiskt handverk ella hondarbeiði.
- Telduførleiki til vanligt samskifti.

**SJÓNDEPILIN BJÓÐAR:**
- Fakliga frálæru um sjón og sjóntrupulleikar – atlit og arbeiðshættir.
- Upplæran innan fakøkið við t.d. handaligum arbeiði – møgulig skeið.
- Møguliga vitjan á líknandi Virkishúsi aðrastaðni.

Starvið er fulltíðarstarv og setananarviðurskiftini eru sambært viðkomandi sáttmála, sum eru galdandi fyri økið.

Ynskiligt er at starvið verður sett frá 1. apríl 2009 ella skjótast gjørligt. Umsóknarfreistin er fríggjadagin 13. februar 2009.
Eru fyrispurningar, kunnu tit ringja til Sjóndepilin tlf. 31 82 22 og spyrja eftir leiðaranum.

Hevur hetta starv tín áhuga, send so umsókn við prógv og CV til:
Sjóndepilin, Att. Leiðarin
Boks 2074, FO-165 Argir.

Grafik Studio

**Fakta um Virkishúsið:**
Virkishúsið er deild undir Sjóndeplinum. Húsið verður rikið sum sjálvstøðug eind og liggur í miðbýnum í Havn. Brúkararnir, sum eru sjónveikir eru eisini léttari seinmentir. Dagliga vera 2 starvsfólk knýtt at húsinum saman við møguligum gestalærarum.

Í Virkishúsinum verður vart arbeiði á træðverkstaði, ymiskt handaligt arbeiði, arbeiði í køki, sosial tiltøk, tiltøk í býnum, einsæris ella í bólkum. Pláss verður fyri uml. 10 viðskiftafólkum.

Málið er at geva brúkarunum ein gerandisdag við virðiligum uppgávum og innihaldi allar yrkadagar.

SJÓNDEPILIN
Sjóndepilin - Íslandsvegur 10 A
Postrúm 2074 - 165 Argir
Tlf. 318222 - Fax. 319288 sjon@sjondepilin.fo




javni

## Javni skipar fyri eyka aðalfundi

Á dagsskrá er umlegging av láni til umbygging av ognini Hoydalsvegur 40.

Fundurin verður á skrivstovuni hjá Javna við Hoydalsveg 40, leygardagin 14. februar 2009 kl. 15.30

**Javni**

Lesið Sosialin - so eru tit við